Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

# Bergtóku kenslurnar hjá føroyingum






Vit vistu, at tað fór at verða stórt – men so stórt og kensluborið hevði neyvan nakar væntað. Við fimm milliónum krónum vístu føroyingar, at vit megna at standa saman, tá ið á stendur.

Vit hava hoyrt um tað leingi og væntaðu so eisini eitt ordans brak. Við Føroya Symfoniorkestri á odda kann tónleikagóðskan neyvan gerast annað enn framúr. Og so varð eisini leygarkvøldið í Norðurlandahúsinum. Tónleikararnir hetta kvøldið kunnu ikki sigast at verða annað enn framúr, og serstakliga Petsy Tvørfoss fekk undirritaðu at fáa gásarhold av vøkru og ógvusligu røddini.

**Vertirnir væl fyrireikaðir**

Sigrun Brend, John Sigurd Johannesen, Kaj Joensen og Óluvá Zahariassen stóðu fyri sendingini í Sjónvarpinum, og hesi vístu veruliga sínar dygdir sum sjónvarpsvertir. Fleiri teirra eru kend frá tíðinda- og ítróttarsendingum, men eisini til undirhald og álvarsligar samrøður duga hesi royndu kringvarpsfólkini síni ting. Eingin ivi um tað.

**Bergtóku kenslurnar**

»Føroyar móti Krabba«. Ja, bert heitið á tiltakinum boðar frá, at tað sannlíkt verður eitt kensluborið kvøld. Sendingin legði eisini upp til, at kenslurnar hjá hyggjarunum skuldu endurvendast. Vit sóu eina ørgrynnu av føroyingum, sum høvdu havt krabbamein – men yvirlivdu. Og sólskynssøgur av ymsum slag, sum góvu okkum hyggjarum eina avslappaða kenslu av, »at tað gongur nokk tað heila«. Nokso typiskt føroyskt. Vit vilja ikki vísa tað keðiliga við øllum. Eingin orsøk at ræða nakran.

Men so kom Inga.

Kringvarpið hevði av álvara lagt orku í júst hetta innslagið, og við myndum frá hondbóltstíðini hjá sterku Danberg kvinnuni, myndum frá hennara jarðarferð, og samrøður við tey, sum eftir henni sita, sótu allarhelst øll í landinum við klumpi í hálsinum og tárum í eygunum.

Undirritaða megnaði í øllum førum ikki at halda eyguni turr, tá ið saknurin eftir Ingu Danberg so væl bleiv lýstur gjøgnum orðini hjá familju hennara.

Sat heima í stovuni, og hugdi eftir »Føroyar móti Krabba«, og við rennandi eygum, kenslum og tankum fór tann afturvendandi tankin um at leggja sigarettirnar á hyllina aftur at spøkja.

Frálíkt tiltak, og hattin av fyri Kringvarpinum, Norðurlandahúsinum, Krabbameinsfelagnum og ikki minst teimum nógvu fólkunum, sum deildu sína søgu við okkum. Serstakliga familjan hjá Ingu Danberg, sálu.

Fimm milliónir krónur vísir veruliga, at føroyingar kunnu standa saman, tá ið á stendur, og tað gjørdu vit leygarkvøldið.